## Símun var dagsins maður

Símun Samuelsen skoraði tvey av málunum, tá Keflavík við 3-1 heimasigri sendi oddaliðið úr steypakappingini. Keflavík er einasta liðið, sum fyrr í summar hevur vunnið á FH, og fyrri stuttum endaði tað javnt, tá liðini hittust í landskappingardysti. Í gjárskvøldið hittust liðini aftur. Føroyski landsliðsleikarin var sera eyðsýndur, og umframt bæði málini, átti hann stóran lut í fyrsta málinum. Tískil er Keflavík í hálvfinaluni.



## Alonso vil til Madrid

Xabi Alonso hevur skrivaliga givið Liverpool boð um, at hann vil sleppa á sølulistan. Spanski miðvallarin er høgt í metum hjá Rafael Benitez í Liverpool, og venjarin hevur støðugt sagt, at hann ikki ætlar at selja Alonso. Nú hevur Alonso tó sjálvur boðað frá, at hann ynskir at verða seldur. Í sponskum og enskum miðlum verður væntað, at Real Madrid og Liverpool fara at semjast um eina upphædd áljóðandi tær 244 milliónir krónirnar.






Eyðun Klakstein og eftir øllum at døma Heðin Askham, fara at standa við síðulinjuna við Margáir sunnudagin

EB/Streymur – KÍ:

# Báðir partar við nýggjum venjara

**Bæði EB/Streymur og KÍ hava nýggjar mans við róðrið sunnudagin, men dyggasti smeiturin hjá KÍ er, at tað er ógvuliga ivasamt, um Jákup Mikkelsen kann spæla**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá ið klaksvíkingar vandu ólavsøkuftan, varð landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen skaddur. Síðani hevur hann ikki verið førur fyri at venja, og tað er sera ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla í Streymnesi sunnudagin. Um Jákup ikki verður við, so verður tað 17 ára gamli Eilif Arge, ið fer at verja KÍ málið.

Talan er um vøddaskaða í lærinum. Jákup hevur fingið viðgerð síðani mikudagin. Talan er um kapping við tíðina, og tað tykist ganga rætta vegin. Men í Klaksvík høvdu tey fyrrapartin ikki serliga gott mót um, at tað skal ganga so skjótt, at Jákup verður førur fyri at spæla longu sunnudagin.

Vongverjin í vinstru, Jógvan Isaksen, verður heilt víst ikki við. Hann sá gult í Sørvági og er tí leikbannaður. Heldur ikki venjarin Alexander Djordjevic verður við á KÍ beinkinum. Hann er staddur uttanlands, og tí verður tað Eyðun Klakstein, sum fer at hava ábyrgdina av KÍ liðnum.

Hjá EB/Streymi er hinvegin betri vorið. Venjarin er útskiftur og allir mans eru tøkir. Tað kemur væl við, tí ein sigur á KÍ má metast at vera eitt krav.

Hetta skuldi heldur ikki verið ein ógjørlig uppgáva, tí eftir tapið í steypafinaluni eru heimamenninir svangir eftir at prógva, at teir framvegis teljast millum landsins bestu lið.

**Dystaryvirlit:**

| | |
|---|---|
| HB – 07 Vestur | Georg Rasmussen |
| Víkingur – AB | Lars Müller |
| B68 – B36 | Bárður Mortensen |
| EB/S – KÍ | Eiler Rasmussen |
| NSÍ – ÍF | Petur Reinert |

NSÍ - ÍF:

# NSÍ fær vitjan av sínum egnu

**Tveir av álopsspælarunum hjá ÍF búgva í Runavík, har teir eru uppaldir í NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Oyggjauppgerðin við Løkin verður mánakvøldið, tá ið punktum verður sett fyri 17. umfar.

Bæði í Runavík og í Fuglafirði verður sagt, at allir spælararnir eru tøkir. Í Fuglafirði hava teir saknað annan av venjarunum, Abraham Løkin, til venjingar. Eftir at hann kom aftur úr Lyngby við U-19 landsliðnum hevur ÍF venjarin, sum býr í Runavík, verið sjúkur og seingjarliggjandi.

Merkisvert er tað, at bæði ÍF venjarin og tveir av fremstu álopsspælarunum hjá ÍF búgva í Runavíkar kommunu. Andy Olsen úr Søldarfirði hevur leingi spælt í Fuglafirði, og í summarsteðginum flutti Øssur Dalbúð úr NSÍ og til ÍF.

Øssur slapp ikki framat í NSÍ álopinum, tí Karoly Potemkin eigur fast pláss. Hann skoraði nógv mál tey fyrstu umførini, men seinastu tíðina hevur tað verið meiri friðarligt kring hann. Nú fæst at síggja, um tað verður Potemkin ella Øssur Dalbúð, sum fara at skora mál við Løkin mánakvøldið.

Rógvi Jacobsen spældi ein hálvan tíma ímóti HB. Hann verður við ímóti NSÍ, men tað verður ikki roknað við, at hann verður millum teir fyrstu ellivu.

Tá ið NSÍ sunnudagin hevði vitjan av B36, var tað einki, sum boðaði frá, at tað ikki fer at rigga, nú Hjalgrím Elttør er farin úr felagnum.

ÍF var í Gundadali síðsta sunnudag. Úrslitið ímóti HB var málleysur javnleikur, og fuglfirðingar fóru væl nøgdir til hús aftur.

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 16 | 10 | - | 5 | - | 1 | 39 | 22 | 17 | 35 |
| 2 | B68 | 15 | 8 | - | 4 | - | 3 | 32 | 25 | 7 | 28 |
| 3 | Víkingur | 15 | 8 | - | 3 | - | 4 | 29 | 19 | 10 | 27 |
| 4 | NSÍ | 16 | 8 | - | 3 | - | 5 | 34 | 25 | 9 | 27 |
| 5 | EB/S | 14 | 6 | - | 4 | - | 4 | 25 | 19 | 6 | 22 |
| 6 | B36 | 15 | 4 | - | 5 | - | 6 | 20 | 28 | -8 | 17 |
| 7 | ÍF | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 20 | 23 | -3 | 16 |
| 8 | AB | 15 | 4 | - | 4 | - | 7 | 12 | 21 | -9 | 16 |
| 9 | KÍ | 16 | 3 | - | 5 | - | 8 | 20 | 29 | -9 | 14 |
| 10 | 07 Vestur | 16 | 1 | - | 5 | - | 10 | 22 | 42 | -20 | 8 |

**Formbarometrið**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 17 | 10 | 7 | 14 |
| 2 | HB | 6 | 3 | - | 3 | - | 0 | 13 | 8 | 5 | 12 |
| 3 | Víkingur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 9 | 6 | 3 | 10 |
| 4 | EB/S | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 14 | 12 | 2 | 10 |
| 5 | KÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 13 | 13 | 0 | 10 |
| 6 | ÍF | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 5 | 4 | 8 |
| 7 | NSÍ | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 13 | 11 | 2 | 7 |
| 8 | B36 | 6 | 1 | - | 3 | - | 2 | 8 | 11 | -3 | 6 |
| 9 | AB | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 5 |
| 10 | 07 Vestur | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 3 | 13 | -10 | 2 |

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 16 | 9 | - | 4 | - | 3 | 32 | 24 | 8 | 31 |
| 2 | B71 | 16 | 9 | - | 3 | - | 4 | 35 | 21 | 14 | 30 |
| 3 | HB | 16 | 8 | - | 4 | - | 4 | 33 | 18 | 15 | 28 |
| 4 | TB | 16 | 8 | - | 4 | - | 4 | 30 | 26 | 4 | 28 |
| 5 | FC Hoyvík | 16 | 8 | - | 1 | - | 7 | 21 | 24 | -3 | 25 |
| 6 | B68 | 16 | 7 | - | 2 | - | 7 | 39 | 29 | 10 | 23 |
| 7 | NSÍ | 16 | 6 | - | 3 | - | 7 | 29 | 34 | -5 | 21 |
| 8 | Víkingur | 16 | 5 | - | 5 | - | 6 | 23 | 23 | 0 | 20 |
| 9 | Skála | 16 | 4 | - | 2 | - | 10 | 17 | 27 | -10 | 14 |
| 10 | MB | 16 | 1 | - | 2 | - | 13 | 18 | 51 | -33 | 5 |